## Stríð um løn

Í Íslandi hevur stríð tikið seg upp um, hvørt Páll Magnússon, útvarpsstjóri, fær ov góða løn ella ikki. Í fjølmiðlunum er komið fram, at tá útvarpið bleiv skipað sum alment lutafelag, fór lønin hjá stjóranum upp í 1,5 mió. íslendskar krónur um mánaðin. Sjálvur sigur stjórin, at hetta er tann løn, sum fólk í tilsvarandi størvum fáa. Onnur starvsfólk í útvarpinum hava boðað frá, at tey fara at krevja munandi lønarhækking, tá samráðingar verða til várs.



*Páll Magnússon, útvarpsstjóri. Fær hann ov góða løn? (Mynd: Vísir)*

## Fjallarenning sunnudagin

Sunnudagin 28. oktober skipar Faroeadventures fyri fjallarenning. Tað verður skipað eftir sama leisti sum undanfarnu kappingar. - Tó so, at vit aftan á tvær royndarkoyringar fara at koyra við meira nágreiniligum reglum. Tað vil siga at vinnarin verður tað liðið, sum loysir allar uppgávurnar skjótast, siga fyrireikararnir. Byrjað verður í Havn. Tvær kappingar eru, ein fyri væl vand og ein fyri motionistar. "Elituliðini" byrja klokkan 9 og motiónistar byrja klokkan 9:30. Kappingin er ein liðkapping. Eitt lið er samanset av fýra persónum, og skal liðið fylgjast og koma í mál saman. Tíðin verður tikin eftir síðsta persóninum, sum kemur í mál. Sjálv kappingin er løgd eftir sama leisti sum kunningarrenning. Postarnir vera umleið 8 í tali. Á nøkrun postum skulu loysast uppgávur og øðrum bert "klippast". Næsta kapping verður Kristi Himmalfaradag 1. mai 2008. Tilmelding: hansi@altfyrieitt.fo

# Vit bíða framvegis eftir

**Nógv virksemi er í Hvannasunds kommunu í hesum døgum: Skúlin verður útbygdur. Ein handil letur upp um stutta tíð, og helst verður nýggjur barnagarður bygdur í næstum. Alt hetta kann tó ikki forða fyri, at fólk umhugsa at flyta úr kommununi. Orsøkin: Vánaliga ferðasambandið til meginøkið**

BYGDAMENNING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



**Hvannasund:** Fólkið í bygdunum báðumegin Hvannasund hava eisini merkt til økta ferðslu, eftir at Norðoyatunnilin lat upp.

Tey fegnast um møguleikan at sleppa úr bygdini og inn á meginøkið. Men áðrenn tey koma so langt, verða tey møtt av eini aðrari forðing: Tunlunum á Borðoynni.

Hesir tunlarnir eru ikki hóskandi til nútíðina, og tí eru tað mong sum hveppast við at skula koyra gjøgnum teir. Eisini fólk, sum búgva norðanfyri tunlarnar.

Hesin boðskapurin hoyrist eisini í Hvannasunds kommunu. Borgarstjórin, Júst Poulsen er ein teirra, sum hoyrir tað sama frá bygdarfólkinum.

- Fólkið her má síggja, at myndugleikarnir veruliga vilja gera nakað við ferðasambandið.

- Hendir einki við tunlunum, óttist eg snøgt sagt fyri, at tað verður trup-

## Tunnil Norður um Fjall

**Hjá Landsverki verða í løtuni gjørdar kanningar fyri at avloysa Árnafjarðartunnilin og Hvannasundstunnilin**

Í dag er støðan hon, at ymiskar loysnir til nýggja farleið hava verið viðgjørdar, og nakrar innleiðandi jarðfrøðiligar kanningar og kostnyttukanningar eru gjørdar.

Loysnin, sum arbeitt verður við víðari, er at gera nýggjar tunlar parallelt við verandi tunlar Norður um Fjall.

Nýggju tunlarnir liggja nakað lægri.

Í løtuni verða jarðfrøðiligar kanningar gjørdar, har nýggju tunlarnir eru planlagdir at vera. Nakrar kjarnuboringar verða gjørdar nú í oktober og november.

Ein frágreiðingar um jarðfrøðina á staðnum verður klár í ár.

## Fólk umhugsa at flyta – úr kommununi

Júst og mong onnur í Hvannasunds kommunu duga at síggja, at tunlarnir eru ein stór forðing fyri menning í økinum.

Tey sum byggja hús vita alt um, hvussu trupult – fyri ikki at siga ógjørligt – tað er at fáa byggitilfarið úr Klaksvík og til økið, har húsini skulu byggjast.

- Og eg hoyri fólk her siga beinleiðis, at tey umhugsa at flyta aðrastaðni, um ikki okkurt ítøkiligt fer at henda í tunnilsmálinum.

- So tú skilir, at hetta er ein álvarsom støða, sigur Júst, ikki sørt harmur á málinum.

### Ikki rópt ov hart

Hvannasunds kommuna hevur kortini ikki gjørt einki fyri at vísa myndugleikunum á hesa óhepnu gongdina og støðuna í dag.

Fyri fýra árum síðani vóru tey á fundi við Landsverk, har tey greiddu teimum frá støðuni og komu við einum uppskoti um, hvar ein nýggjur tunnil kundi liggja.

- Men hinvegin, vit hava kanska ikki rópt ov nógv upp um hetta málið. Eg trúgvi tó at myndugleikarnir kenna okkara umstøður, sigur borgarstjórin.

Vinnumálaráðharrin, Bjarni Djurholm hevur eisini víst á, at tunnilin norðureftir skal hava høga raðfesting.

- Tað hava vit so trúð uppá. Nú vísir tað seg kanska, at vit hava verið ov góðtrúgvin.